Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Henrik Old, løgtingsmaður

Svarari: Dennis Holm, landsstýrismaður í fiskivinnu-og samferðslumálum

Evni: Kvotur av sild, makreli og svartkjafti 2023

Spurningar:

1. Hvussu nógv tons av sild eru eftir at fiska, sum kunnu fiskast í 2023?
2. Hvussu nógv tons av makreli eru eftir at fiska, sum kunnu fiskast í 2023?
3. Hvussu nógv tons av svartkjafti eru eftir at fiska, sum kunnu fiskast i 2023?

Viðmerkingar:
Nú einans 2 mánaðir eru eftir av fiskiárinum 2023 er umráðandi at bera so í bandi, at so nógv sum møguligt av uppsjóvarkvotunum fyri árið í ár verða fiskaðar í hesum árinum.
Her er talan um vanligar kvotur og royndarkvotur.
Tí verður hesin fyrispurningur settur landsstýrismannninum.

Á Løgtingi, 27. oktober 2023

Henrik Old